## Terry tvær milliónir um vikuna

Chelsea ætlar at spenna seg út fyri at halda liðformanin John Terry í felagnum hóast áhugan frá teimum pengaríku eigarunum av Manchester City. Sambært enskum miðlum er Chelsea sinnað at bjóða John Terry nýggjan sáttmála, har hann fær tvær milliónir krónur í løn – um vikuna! Hetta hevði verið størsti sáttmálin í enskum fótbólti, um hann gerst veruleiki.



## Milan lúrir eftir norðmanni

Italska felagið AC Milan hevur fingið gott eygað á unga norska verjuspælaran Vegard Forren, sum spælir fyri Molde. 20 ára gamli Forren stendur á gáttini til norska landsliðið, og um vikuskiftið hava umboð fyri AC Milan verið í Noregi og hugt eftir spælaranum. Áður hevur enska felagið Liverpool eisini sýnt áhuga fyri Forren.

Skála-B68 1-2 (0-0):

# Takk fyri hesuferð?

*Skála*

*B68*

**Fótbóltsføroyar mugu eftir øllum at døma takka skálamonnum fyri teirra leiklut í bestu deildini á hesum sinni. Tapið á heimavølli móti B68 í gjár hevði við sær, at seks stig eru til bjargingina, og tað er lítið sannlíkt, at Skála vinnur munin aftur, nú tólv stig eru eftir at spæla um**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*unisosialurin.fo*

Myrkið legði seg so spakuliga yvir Mýruhjalla. Heimafólkið lútaðu við høvdinum, sum høvdu tey sæð skriftina á vegginum. Nakrir av leikarunum venda nøsini alt fyri eitt niðan móti húsinum, aðrir verða sitandi á beinkinum, meðan summir hóast alt vera verandi á vøllinum og takka fyri dystin. Men eyðsæð er vónbrotið á Skála-bygd.

Møguleikin fyri at bjarga sætinum í Formuladeildinum gjørdist upp aftur meira fjarður hjá Skála í gjár. Og hóast útsagnirnar – sum tær sjálvandi skulu – eru, at teir framvegis ikki síggja seg sum niðurflytarar, so er veruleikin, at Skála allarhelst eigur eitt lið í næstbestu føroysku fótbóltsdeildini í komandi kappingarári.

### Tóku ikki av

Tað er nógv vatn runnið í ánni, síðan Johan Nielsen stóð á odda fyri besta mansliðnum hjá Skála. Kaffi smakkaði helst betri á Skála, tá toppliðið við flotta fótbóltspælinum ferð eftir ferð koppaði mótstøðumonnunum. Og tá skuldi fáur trúð, at tvey ár seinni var uppgávan fyrst og fremst at sleppa undan niðurflyting.

Leikararnir vistu, hvat tað snúði seg um. Eyðnaðist tað ikki at fáa fult, samstundis sum onkur vann í Klaksvík, so varð tungt. Og soleiðis skuldi tað ganga.

Fótbóltspælið var einki serligt. Vøllurin gjørdi sítt til, at ferð ongantíð kom á bóltin. Teir vóru fáir, sum vístu bóltkynstur, og ofta stóðust málroyndirnar av tilvildarligum og ófantaligum villum. Hinvegin skalt tú kanska heldur ikki væntað ov nógv av tveimum liðum, sum liggja á niðaru hálvu á stigatalvuni. Meira ætlan var í spælinum hjá heimaliðnum, og teir høvdu eisini møguleikar at leggja seg á odda. Men hvørki Bogi Gregersen ella Alexandur Johansen tóku av, tá teir vóru í góðari støðu.

Tað tóktist ikki hava stórvegis ávirkan á verjupartin hjá B68, at Arnbjørn Danielsen ikki var tøkur vegna skaða. Øssur Hansen hevði trupult einu løtuna á vinstra vongverjanum, og tað bøtti um støðuna, at Brian Andresen var fluttur út í vinstru sum vongur. Í miðverjuni tóku vælvoksnu Pól Jóhannus Justinussen og Jóhan Dávur Højgaard sær av tí mesta, sum Bogi Gregersen hevði at bjóða.



*Sum tað sæst á myndini, so eru teir hjá Skála heldur kroystir í løtuni. Enn eru fýra umfør eftir, men tað tykist alt meira greitt, at teir appelsin-littu skulu teljast millum niðurflytararnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Málini

Toftamenn løgdu seg á odda, tá átta minuttir restaðu av fyrra umfarinum. Hvítklæddu gestirnir vunnu bóltin áraka miðstrikuna, tá Jann Martin Mortensen spældi bóltin fyri føturnar á Ahmed Keita. Framherjin slapp frá tveimum verjuleikarum, áðrenn hann legði bóltin til rættis fyri Jann Inga Petersen, sum smekkaði til. Predrag Markovic var á veg út eftir bóltinum, tá leðurkúlan tók í mótstøðumann, og so var B68 á odda.

Og lítla løtu eftir hvíldina var aftur galið hjá Skála. Bólturin var spakuliga lyftur upp um verjuna, tá Ahmed Keita – sum í fyrra hálvleiki misnýtti tveir opnar møguleikar – var fyrstur á eftir kapprenning. Og so var lætt at fara framvið málverjanum og stýra bóltinum seinastu metrarnar um málstrikuna.

Pætur Dam Jacobsen gav heimaliðnum eina lítla vón, tá hann minkaði um munin eftir hornaspark. Táð vóru fimm minuttir eftir at spæla. Men hóast trýst seinastu løtuna, so fingu skálamenn ikki meira enn tað.

### KÍ ella B71

Skála hevur áður gjørt eitt ordiligt hál í seinastu umførunum. Men tað er lítið sannlíkt, at tað endurtekur seg í ár. Komandi uppgávurnar ljóða ÍF á útivølli, Víkingur á heimavølli, EB/Streymur á heimavølli og NSÍ á útivølli. Tað kann roknast við, at KÍ fær okkurt stig afturat, so uppgávan verður ómetaliga torført hjá Skála. Tí er tað mest ein spurningur, um tað verða klaksvíkingar ella B71, sum spæla í Formuladeildini í 2009.

Hinvegin hevur tað gingið fram úr væl hjá B68 eftir summarsteðgin. Liðið hevur lyft seg úr botnstríðnum, og nú eru bara trý stig upp til Víking á fimta plássinum. Og tað verður næsta málið hjá B68.

## Vit geva ikki upp

John Petersen og hansara leikarar vilja ikki staðfesta, at skálamenn verða millum teir næstbestu í komandi kappingarári.

*Nú verður trupult hjá tykkum, nærmast ógjørligt. Takkar Skála fyri seg í Formuladeildini á hesum sinni?*

- Tað er framvegis møguleiki fyri at bjarging, og vit stríðast líka til, at tað er ikki er gjørligt longur. Stigatalvan vísir, at tað verður sera trupult, men vit geva ikki upp, sigur John Petersen, venjari hjá Skála.

Hóast talan var um sera týðandi dyst, so hevði lokala hetjan á Skála ikki gjørt stórvegis burtur úr at sett sínar leikarar upp til dystin.

- Vit vistu allir, hvønn týdning hesin dysturin kundi fáa. Og vit vóru eisini uppsettir, men tað rakk so ikki í dag.

*Og tað var uppiborið, at B68 fekk øll stigini?*

- Tað má tað vera, tá teir skjóta tvey mál, og vit eitt. Vit høvdu møguleikarnir, men tóku ikki av, sigur ein vónbrotin John Petersen, sum nú hevur til uppgávu at motivera sínar leikarar til dystirnar, sum resta av kappingarárinum.

## Meira stabilir

B68 hevur vunnið eina rúgvu av stigum í seinnu kappingarhálvu. Tað hevur havt við sær, at leikararnir kunnu draga andan lættliga, nú flestu liðini hava sett inn endaspurtin. Málið at sleppa undan niðurflyting er rokkið, og nú verður hugt uppeftir.

*Hvør er munurin á fyrru og seinnu hálvu hjá tykkum?*

- Vit eru meira stabilir. Verjuparturin hevur riggað sera væl, og alsamt færri mál fara ígjøgnum. Hinvegin eru vit eisini byrjaðir at skjóta mál. Vit høvdu fleiri skaðar fyrstu mánaðirnar, og tað var sjáldan, at vit høvdu møguleikan at spæla við sama liði tvær ferðir upp í slag. Vit eru eisini farnir frá upplegginum at liggja høgt á vøllinum til at vera meira verjukendir. Og tað hevur riggað væl, staðfestir Bill McLeod Jacobsen, venjari hjá B68.

Hann staðfestir somuleiðis, at nú hyggja toftamenn upp eftir stigatalvuni.

- Tað eru bara trý stig til Víking, og sjálvandi royna vit at leggja teir aftur um okkum, sigur Bill McLeod Jacobsen, sum metti sigurin hjá B68 verða uppibornan á Skála í gjár.